## Úr Løgtinginum



# Eykajáttan til pensónistar

*Uppskot um at hækka viðbót pensjónistanna til sjón- og útvarpsgjal var til fyrstu viðgerðar hósdagin*

John Johannessen

Eitt av teimum fýra málunum, ið vóru til fyrstu viðgerðar á tingfundinum hósdagin, var eitt uppskot frá Sambandsflokkinum um at hækka pensjónsviðbótina fyri sjón- og útvarpsgjald. Talan er um eitt eykajáttanaruppskot.

Sambandsflokkurin heldur, at tá bæði útvarpsgjald og sjónvarpsgjald eru hækkað, eigur viðbótin, ávísir pensjónistar fáa fyri hesi gjøld, eisini at verða hækkað.

Flokkurin vísir í viðmerkingunum til uppskotið á, at talið av pensjónistum, sum í dag fáa slíka viðbót, er 3.829. Tilsamans eru sjón- og útvarpsgjøldini hækkað 231,27 krónur. Tískil mælir Sambandsflokkurin at hækka kotoina til hesa viðbót við 886.000 krónum.

Útvarpsgjaldið fyri 1999 var 1.384,38 krónur við, meðan sjónvarpsgjaldið fyri 1999 var 1.384,35 krónur . Fyri 2000 eru bæði útvarps- og sjónvarpsgjøldini sett at vera 1.500 krónur. Útvarpsgjaldið hækkar við 115,62 krónum, meðan sjónvarpsgjaldið hækkar við111,65 krónum.

Uppskot Sambandsfloksins varð á tingfundinum hósdagin beint í fíggjarnevndina.

# Granskoðan til fyrstu viðgerðar

John Johannessen

Umframt fyrstu viðgerðina av uppskotinum um, at hækka pensjónsviðbót pensjónistanna, vóru tríggjar aðrar fyrstu viðgerðir á dagsskránni.

Talan var í øllum trimum førum um viðgerðir av grannskoðan av almennum roknskapum.

Tann fyrst av teimum trimum almennu roknskapunum var av roknskapinum hjá Menningargrunni Ídnaðarins fyri fíggjarárið 1998.

Næsta almenni roknskapurin, ið var til viðgerðar, var tann hjá Føroya Ídnaðargrunni, og var eisini í hesum førinum talan um roknskapin fyri fíggjarárið 1998.

Seinasti roknskapurin var tann fyri Íleggingargrunnin fyri Føroyar, og var talan enn einaferð um roknskapin fyri fíggjarárið 1998.

Eftir fyrstu viðgerðirnar skuldi Signar á Brúnni, landsstýrismaður, svara Rúni Sivertsen, løgtingskvinnu uppá fyrispurning nummar 100-18/1999 um Skúlan á Trøðni og Sernámsdepilin.

Næstseinasta punktið á dagsskránni var svar uppá fyrispurning frá Lisbeth L. Petersen, løgtingskvinnu, til Finnboga Arge Landsstýrismann viðvíkjandi barnsburðargrunni.

Seinast á dagsskránni fyri tingfund nummar 53 hesa tingsetuna var framløga.

# Aðalorðaskifti um búskaparvøkstur

John Johannessen

Tingformaðurin hevur sett næsta tingfund at vera týsdagin 22. februar klokkan tíggju fyrrapartin.

Á skránni er eittans mál, og er tað tingmál nummar 101-6/1999, sum er aðalorðaskifti um frágreiðing frá landsstýrismanninum í vinnumálum um gagnligastu fíggjar- og lógarkarmar til at fremja búskaparvøkstur og økja íløgurnar í Føroyum.

Fundurin endar við framløgu.



*Fríggjadagin legði »Norðborg« sína seinastu last upp í Bodø í Noregi og sama dag fekk skipið navnabroytan til »Norðborg II«*

# »Gardar« verður yvirtikin mánadagin

*Og sama dag sum skipið verður yvirtikið, fær »Gardar« navnabroytan til »Norðborg«. Og í gjár landaði »Norðborg« sína seinastu last í Noregi og fekk navnabroytan til »Norðborg II«. Mánadagin verður »Næraberg« helst eisini yvirtikin, so hetta verður minniligur dagur í Klaksvík*

Ólavur í Beiti

Tað er Pf. Hvalnes í Klaksvík sum eigur bæði »Gardar« og »Norðborg«, og nú »Gardar« verður yvirtikin mánadagin yviri í Noregi, í Haugesund, verður »Norðborg« tikin úr flotanum og samráðingar eru í løtuni við felag í Ghana í Afrika at keypa »Norðborg«.

Fríggjadagin legði »Norðborg« sína seinastu last upp í Bodø í Noregi og sama dag fekk skipið navnabroytan til »Norðborg II«.

### 28 mans

Mánadagin verður so »Gardar« yvirtikin av føroyska felagnum og fær sama dag navnabroytan til »Norðborg«.

Og sambært Pf. Hvalnes, so verður útgerð tikin umborð beinanvegin og seinni í vikuni er so ætlanin at fara til fiskiskap, so skipið kemur ikki hendavegin nú.

Helvtin av manningini er í Noregi í løtuni og riggar skipið til, og seinni verður hin helvtin av manningini flogin yvir til Noregs, helst við leiguflogfari.

Tá ið farið verður til fiskiskap við »Norðborg« verður manningin 28 mans. Av hesum koma 9 norðmenn at vera við frá byrjan, verður sagt frá reiðarínum.

### 400 mió. krónur

Tað er stórur dagur í Klaksvík mánadagin, tí um sama mundi, sum Pf. Hvalnes yvirtekur »Gardar«, verður helst eisini stóri trolarin »American Empress«, sum JFK Trol í Klaksvík skal hava, yvirtikin. »American Empress« hevur nú fingið navnabroytan til »Næraberg«, og týsdagin ella mikudagin verður hann í Føroyum, tá vit fara at hoyra meiri um hesa áhugaverdu verkætlan.

Samlaðu íløgurnar hjá hesum báðum vinnufyritøkum í Klaksvík liggja um 400 milliónir krónur, so á mangan og ein hátt er hetta minniligur dagur í Klaksvík.

# Barnsburðargrunnurin fíggjast av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum

*Nevnd er sett at gera uppskot um, hvussu Barnsburðargrunnurin kann skipast, og nevndin er farin til verka at fyrireika uppskot til løgtingslóg um grunnin, sigur Finnbogi Arge í svari til Lisbeth L. Petersen*

Ólavur í Beiti

Lisbeth L. Petersen spurdi herfyri Finnboga Arge nakrar spurningar um Barnsburðargrunnin og vildi hon hava at vita, hvussu langt fyrireikingarnar eru komnar, nær grunnurin verður settur á stovn og hvussu grunnurin skal fíggjast.

Lisbeth L. Petersen vísti á í viðmerkingunum, at viðvíkjandi teim alment løntu er nú ein skipan galdandi, tá avtala er gjørd um spurningin við sáttmála, sum tryggjar kvinnuni fulla løn, tá hon fer í barnsburðarfarloyvi, men á privata arbeiðsmarknaðinum er støðan ikki hin sama.

– Í mongum føri er tað arbeiðsgevarin, sum ger av, hvussu málið um barsilsfarloyvi verður umsitið. Fíggjarliga orkan hjá arbeiðsgevara kann vera avgerandi fyri, hvørjar sømdir kvinnan, sum verður við barn, fær. Hetta sást og eru dømi um, tá kreppan í nítiárunum leikaði harðast á, og kvinnurnar á arbeiðsmarknaðinum vórðu mettar sum ein fíggjarlig byrða fyri summi, segði Lisbeth L. Petersen í viðmerkingunum.

### Nevnd sett

Finnbogi Arge, landsstýrismaður, sigur í svarinum, at nevnd er sett at gera uppskot um, hvussu grunnurin kann skipast, og nevndin er farin til verka at fyrireika uppskot til løgtingslóg um grunnin, sum verður lagt fyri Løgtingið í komandi tingsetu.

– Barnsburðargrunnurin kann setast á stovn tá og um Løgtingið hevur samtykt uppskotið, og tað er staðfest og lýst sum løgtingslóg, vónandi í hesum árinum, og ætlanin er, at grunnurin skal fíggjast av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, sigur Finnbogi Arge í svarinum.



*Lisbeth L. Petersen, tingkvinna Sambandsfloksins*



















# Kundi tú hugsað tær at verið á úrvalsliði ?

Á virki okkara eru nógvir **góðir leikarar**. Men tað er fyrst og fremst gjøgnum samarbeiði, at vit hava skapt eitt sterkt lið. Nú hava vit pláss fyri nøkrum leikarum afturat, og vit sóknast tí eftir evnaríkum persónum við áræði, ambitiónum og hugi at vera við á einum liði, har nógv er at gera, og har arbeitt verður í einum góðum og óhátíðarligum umhvørvi.

**Rasmussen & Weihe** er eitt grannskoðara- og ráðgevingafelag, sum varð stovnað í 1968. Umframt at gera lógarbundna grannskoðan ráðgeva vit á ymsum økjum, t.d. viðvíkjandi roknskapi, bókhaldi, stovnan av virkjum, rakstrarætlanum, skattamálum v.m. Umframt høvuðsskrivstovuna í Tórshavn hava vit eisini skrivstovuhøli í Saltangará.

Ein **útbúgving** hjá okkum gevur eisini møguleikar uttanlands. Í altjóða høpi er felagið limur í heimsins størstu grannskoðarafyritøku PricewaterhouseCoopers, ið hevur meira enn 150.000 starvsfólk í 150 ymsum londum, og hetta samstarv gevur okkara starvsfólkum møguleikar at fáa sær arbeiðsroyndir uttanlands - í princippinum allastaðni, har PricewaterhouseCoopers er umboðað.

Sjálvandi dámar okkum best, at starvsfólk, ið gera eitt gott arbeiði, ynskja at verða verandi í virkinum hjá okkum. Men vit mugu ásanna, at nógv virki leita sær eftir dugnaligum starvsfólki hjá okkum. Hevur tú **viljan og evnini** til at gjøgnumføra eina útbúgving hjá okkum, hevur tú óivað nógvar møguleikar í framtíðini. Hugsar tú frammanundan um víðari útbúgving í útlondum, átti tú kanska í staðin at hugsa um at komið á liðið hjá okkum.

Sjálvt um vit tilætlað gera alt fyri at varðveita okkara góða og óhátíðarliga arbeiðsumhvørvi, má ásannast, at **grannskoðan** í sjálvum sær er eitt álvarsmál. Endamálið við grannskoðan er at gera tað arbeiði, ið er neyðugt fyri at átekna upplýsingar frá einum virki til umheimin. Ein átekning, ið sigur, um upplýsingarnar eru rættvísandi. Í hesum sambandi er neyðugt at læra, hvussu grannskoðanin skal útinnast, og hvat krevst fyri at gera eina átekning. Í okkara arbeiði verður tó eisini ofta neyðugt at ráðgeva innan ymisk øki, og hartil krevst eisini **teoretisk og praktisk vitan**. Lóggávan setir stór krøv til fakliga støðið hjá einum grannskoðara, men innanhýsis setir felag okkara enn størri krøv til dygdina av tí arbeiði, ið gjørt verður. Talan er eisini um stór krøv til persónligu eginleikarnar hjá einum grannskoðara. Hann skal m.a. vera ábyrgdarfullur, álítandi, trúverdur og skilja týdningin av tagnarskylduni.

Fakliga støðið verður uppbygt gjøgnum **teoretiska útbúgving og starvsvenjing** - sigast má tó beinanvegin, at neyðugt er, at tú sjálv(ur) tekur eitt stórt tak.

Vit vænta at tú hevur tikið ella tekur **students-, HF ella HH prógv** í summar, og at tú ert áhugað(ur) í eini búskaparligari útbúgving. Tú var/er eisini millum tey stinnastu í flokkinum hjá tær og hevur hug at sameina eina teoretiska útbúgving við eina praktiska útbúgving. Eisini heldur tú tað vera spennandi at sleppa at virka í vinnulívinum.

Vit bjóða tær eitt **lærupláss**, har tú í fyrstu syftu kanst lesa HD, samstundis sum tú vinnur pening. Vit geva tær møguleika fyri eini búskaparligari útbúgving, ið ikki fæst betri í Føroyum, og sum til fulnar er á sama støði sum tað, ið verður bjóðað aðrastaðni. Aftan á **HD** hevur tú fleiri møguleikar. Velur tú at lesa cand. merc. aud. sum fulltíðarlesandi í Danmark, kanst tú fáa farloyvi, og kanska kunnu vit útvega tær arbeiði í lestrartíðini hjá PricewaterhouseCoopers í Danmark. Tú kanst eisini velja at lesa cand. merc. aud. sum sjálvlesandi, samstundis sum tú arbeiðir í Føroyum. Aftan á cand. merc. aud. er møguleiki at gerast statsautoriseraður grannskoðari. Hevur tú vilja, evni og rættan hugburð, stuðla vit tær sjálvsagt so nógv sum gjørligt í at fullføra tað, sum tú setur tær fyri.

Størvini skulu setast eftir summarfrítíðina ár 2000, men longu í apríl mánaði kunnu vit gera eina setanaravtalu.

Ynskir tú aðrar upplýsingar, kanst tú ringja til okkara og seta teg í samband við Ole Guldborg Nielsen ella Klaus Rasmussen.

Skrivlig umsókn við prógvum og øðrum upplýsingum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi ultimo mars 2000.

Grannskoðarafelagið
**RASMUSSEN & WEIHE**
Statsaut. Revisorar
An associated firm of PRICEWATERHOUSECOOPERS
Á Glaðsheyggi • Box 30 • FO-110 Tórshavn
Tel. (+298) 31 10 17 • Fax (+298) 31 10 18
E-mail: rasmussen@rasmussen.fo • Http://www.rasmussen.fo

Sosialurin - 311820